*Løgtingsins umboðsmaður*

*Ársfrágreiðingin 2013*

LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

# *Ársfrágreiðingin 2013*

Tórshavn, juni 2014

Løgtingsins umboðsmaður
Ársfrágreiðingin 2013
© 2014 Løgtingsins umboðsmaður
Umbróting, prent og innbinding: Føroyaprent

ISBN 978-99918-854-2-1

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# *Innihaldsyvirlit*


I. Um embætið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .9

II. Gongdin í 2013 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 11

III. Hagtøl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13

IV. Samandráttir – álit . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 25

V. Umboðsmaðurin fær fleiri heimildir á barnaøkinum . . . 30

VI. At halda seg kenna . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 35

VII. Grundgevingar fyri at avvísa klagur . . . . . . . . . . . . . 41

VIII. Skjøl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 47

1. Løgtingslóg um Løgtingsins umboðsmann . . . . . . . 47
2. Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Løgtingsins umboðsmann . . . . . . . . . . . . . . . . . . 51
3. Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann . . . . . . 52

# *Til Løgtingið*

Vísandi til § 11, stk. 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann lati eg av hondum hesa frágreiðing um virksemi mítt í 2013. Ársfrágreiðingin skal sambært nevndu grein verða almannakunngjørd áðrenn 1. juli 2014.

Frágreiðingin er býtt upp soleiðis:

I. Um embætið
II. Gongdin í 2013
III. Hagtøl
IV. Samandráttir – álit
V. Grein: Umboðsmaðurin fær fleiri heimildir á barnaøkinum
VI. Grein: At halda seg kenna
VII. Grein: Grundgevingar fyri at avvísa klagur
VIII. Skjøl
1. Løgtingslóg um Løgtingsins umboðsmann
2. Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Løgtingsins umboðsmann
3. Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann

Tórshavn, juni 2014

Sólja í Ólavsstovu

# *I. Um embætið*

Sambært § 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann velur Løgtingið fyri eitt 5-ára skeið ein uttantingsmann at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins. Tann 8. oktober 2010 endurvaldi Løgtingið meg sum Løgtingsins umboðsmann fyri tíðarskeiðið 1. januar 2011 til 31. desember 2015. Eg tók við embætinum á fyrsta sinni tann 1. januar 2006. Umframt meg sjálva hevur embætið verið mannað við løgfrøðiligu medarbeiðarunum mínum, Jóhannu Arge, ráðgeva, Birtu Biskopstø, ráðgeva og Jette Eirikstoft, skrivstovuleiðara.

Í sambandi við at Jóhanna Arge, ráðgevi hevur verið í farloyvi í 2012, varð Majbritt Lamhauge, sett í starv sum fulltrúi í farloyvistíðini. Hon gavst í hesum starvi 1. apríl 2013.

Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins, sum annars í sínum starvi er óheftur av Løgtinginum (§ 3).

Virksemi umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins, t.e. bæði landsins og ta kommunalu (§ 4, stk. 1). Eisini feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, eru fevndir av virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 2). Harumframt eru interkommunalir felagsskapir undirlagdir virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 4). Harafturímóti fevnir virksemi hansara ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum ( § 4, stk. 5 ).

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara, ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti borgaranum (§ 5). Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara (§ 6, stk. 1). Klagarin skal navngeva seg í klaguni, og skal hon vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað (§ 6, stk. 2). Er talan um avgerðir,

sum kunnu leggjast fyri hægri umsitingarmyndugleika, skal hesin møguleiki vera royndur fyrst, áðrenn klagað verður til umboðsmannin (§ 6, stk. 3). Eru hesar treytir loknar, tekur umboðsmaðurin støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í tí máli, ið klagað verður um (§ 6, stk. 4). Umboðsmaðurin kann eisini sjálvur av sínum eintingum taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi (§ 6, stk. 5). Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætisins vegna krevur at fáa fyrilagt. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja øll tey støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum. Hann kann eisini stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum ( § 8 ).

Tá umboðsmaðurin er liðugur við sínar kanningar, ger hann sína niðurstøðu, og metir hann, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt, skal hann boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og/ella kommunustýri frá hesum. Hann hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum og á annan hátt gera vart við meting sína av einum máli, hann hevur kannað. Hann kann eisini mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin (§ 10). Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal hann boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum, og er talan um kommunal ella interkommunal viðurskifti, skal hann eisini boða viðkomandi kommunustýri frá ( § 12 ).

Ein samandráttur av niðurstøðunum hjá umboðsmanninum eru tiknar við í ársfrágreiðingina. Álitini eru at finna í síni fullu longd á heimasíðu umboðsmansins www.lum.fo.

Lógin og ein vegleiðing um, hvussu ein kann klaga til Løgtingsins umboðsmann, eru viðheft ársfrágreiðingini sum skjøl.

Adressan er: Løgtingsins umboðsmaður, undir Bryggjubakka 11, Postsmoga 2008, FO-110 Tórshavn, teldupostadressa: lum@lum.fo. Heimasíða umboðsmansins: www.lum.fo

# *II. Gongdin í 2013*

Í 2013 komu inn 66 klagur. Av teimum klagunum, sum komu inn í 2013, vóru 51 endaliga avgreiddar innan 31. desember 2013. Harumframt vóru 11 klagur avgreiddar, sum vóru innkomnar (men ikki avgreiddar) frá undanfarnu árum.

Talið av klagum er nakað størri enn talið undanfarin ár. Av klagunum, sum eru móttiknar í 2013, vórðu 44 avvístar, svarandi til 67 %. Hetta tal er nakað lægri enn undanfarna árið. Hóast nógvar klagur verða avvístar, merkir hetta ikki, at umboðsmaðurin ikki hevur kannað hesi mál. Í nøkrum av teimum avvístu málunum hevur myndugleikin boðað frá, at kanningin hjá umboðsmanninum hevur viðført, at málið verður tikið upp til nýggja viðgerð. Í øðrum málum vísir kanningin, at umboðsmaðurin ikki metir seg kunna hjálpa klagaranum.

Tann 18. desember 2013 samtykti Løgtingið eina broyting í lógini um Løgtingsins umboðsmann. Endamálið við hesi broyting er at víðka heimildirnar hjá umboðsmanninum til at fevna um privatar stovnar v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum, umframt at lógarfesta kanningarháttin hjá umboðsmanninum. Við hesi nýggju áseting skal umboðsmaðurin tryggja og hava eftirlit við implementeringini av ST-Barnasáttmálanum, herundir rættindum hjá børnum, sum eru ásett í føroyskari lóggávu til tess at lúka skyldurnar hjá Føroyum sambært sáttmálanum.

Ítøkiliga verður hetta eftirlit framt við, at umboðsmaðurin viðger klagur um viðurskifti hjá børnum, tekur mál upp av egnum ávum, fer á eftirlitsvitjanir á stovnum v.m., har børn eru, og við at gera Løgting og landsstýri varug við, um lógir og fyrisitingarligar ásetingar ikki eru sambæriligar við Barnarættindasáttmálan. Týdningarmesta broytingin í lógini er at geva umboðsmanninum heimild at fremja eftirlitsvitjanir á privatum stovnum og í fosturheimum, sum hava ábyrgd av børnum. Hetta er t.d. galdandi fyri frískúlar, bú- og umlættingarstovnar, sum eru privatir, og fosturfamiljur sambært barnaverndarlógini. Grundað

á stóra talið av fosturfamiljum væntast umboðsmaðurin einans at brúka hesa heimild, um ein fosturfamilja hevur fleiri fosturbørn og tískil kann sigast at hava stovnslig eyðkenni.

---------- o O o ----------

Í 2013 heitti grønlendska rættarnevndin á meg um at átaka mær at vera setiumboðsmaður fyri grønlendska umboðsmannin í einari klagu, har bæði tann grønlendski og tann danski umboðsmaðurin hava mett seg vera ógegnigan at viðgera. Løgtingsins Formansskapur viðgjørdi fyrispurningin og játtaði, at eg átók mær at vera setiumboðsmaður í Grønlandi í hesum ítøkiliga máli. Eg havi síðani viðgjørt hesa klagu og skrivað eina niðurstøðu í málinum.

Umboðsmenninir í Noregi, Danmark, Íslandi, Grønlandi og Føroyum koma regluliga saman til fundar eina ella tvær ferðir um árið, har evni av felags áhuga koma til viðgerðar. Í 2013 var bert ein fundur, og varð hann hildin í Keypmannahavn í døgunum 11. og 12. desember.

Í døgunum 2. mai til 4. mai 2013 var tann danski umboðsmaðurin Jørgen Steen Sørensen, á vitjan í Føroyum á fyrsta sinni sum umboðsmaður.

# *III. Hagtøl*

**Klagur innkomnar í 2013 býttar á myndugleikar**

Í 2013 komu inn 66 klagur

Hesar klagurnar vóru býttar soleiðis millum ymsu myndugleikarnar:

Talva 1

| *Myndugleiki:* | *Klagur:* |
|---|---|
| Almannamálaráðið | 1 |
| Fiskimálaráðið | 3 |
| Mentamálaráðið | 3 |
| Vinnumálaráðið | 1 |
| Heilsumálaráðið | 3 |
| Løgmansskrivstovan | 3 |
| Innlendismálaráðið | 4 |
| TAKS | 4 |
| Almannaverkið | 12 |
| Suðuroyar Sjúkrahús | 1 |
| Umhvørvisstovan | 1 |
| Kærunevndin fyri Arbeiðsloysisskipanina | 1 |
| Føroya Kærustovnur | 5 |
| Kringvarp Føroya | 4 |
| Fiskiveiðieftirlitið | 1 |
| Búnaðargrunnurin | 2 |
| Búnaðarstovan | 1 |
| Kommunur | 9 |
| SEV | 2 |
| Handilsskúlar | 1 |
| Studentaskúlar | 1 |
| Studni | 1 |
| Byggifelag | 1 |
| Banki | 1 |
| **Tilsamans** | **66** |

**Klagur innkomnar í 2013 býttar á myndugleikar (talva 1)**



## Innkomnar klagur í 2013 býttar á málsøki og klaguinnihald

Talva 2

| *Málsøki:* | *Tal av klagum* | *Klagur um avgerðir* | *Klagur um málsviðgerð* | *Klagur um atburð o.a.* |
|---|---|---|---|---|
| Starvsfólkamál | 7 | 6 | 1 | |
| Heilsumál | 1 | 1 | | |
| Almannamál | 12 | 4 | 8 | |
| Skattur v.m. | 3 | 2 | 1 | |
| Undirvísing, gransking v.m. | 2 | 1 | 1 | |
| Kommunumál | 1 | 1 | | |
| Fiskivinnumál | 2 | 1 | 1 | |
| Byggimál, búnaðarmál, umhvørvi v.m. | 8 | | 8 | |
| Innlit | 15 | 12 | 3 | |
| Barnaverndarmál | 4 | 1 | 3 | |
| Persónsmál | 2 | | 1 | 1 |
| Arbeiðsmarknaðarmál | 1 | | 1 | |
| Ymiskt | 8 | 1 | 7 | |
| **Tilsamans** | **66** | **30** | **35** | **1** |

**Klagur innkomnar í 2013 býttar á málsøki (talva 2)**



**Klagur innkomnar í 2013 býttar eftir klaguinnihaldi (talva 2)**




**Klagur endaliga avgreiddar í 2013**
Av teimum 66 klagunum, sum komu inn í 2013 vóru 51 endaliga avgreiddar innan 31. desember 2013. Harumframt vóru avgreiddar 11 klagur frá undanfarnu árum.
Úrslitið av viðgerðini var hetta (býtt upp eftir myndugleika):

Talva 3

| *Myndugleiki:* | *Klagur* | *Avvístar* | *Viðgjørdar* | *Viðgjørdar uttan átalu/ tilmæli* |
|---|---|---|---|---|
| Løgmansskrivstovan | 2 | 1 | 1 | |
| Almannamálaráðið | 1 | 1 | | |
| Innlendismálaráðið | 1 | 1 | | |
| Fíggjarmálaráðið | 2 | 1 | 1 | |
| Fiskimálaráðið | 1 | 1 | | |
| Mentamálaráðið | 5 | 4 | 1 | |
| Vinnumálaráðið | 1 | | 1 | |
| Heilsumálaráðið | 3 | 3 | | |
| TAKS | 5 | 4 | 1 | |
| Almannaverkið | 12 | 10 | 2 | |
| Suðuroyar Sjúkrahús | 1 | 1 | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Heilsufrøðiliga Starvsstovan | 1 | 1 | | |
| Umhvørvisstovan | 1 | 1 | | |
| Kærun. fyri Arbeiðsloysissk. | 1 | 1 | | |
| Føroya Kærustovnur | 5 | 3 | 2 | |
| Kringvarp Føroya | 4 | 3 | | 1 |
| Fiskiveiðieftirlitið | 1 | 1 | | |
| Kommunur | 10 | 7 | 3 | |
| SEV | 1 | 1 | | |
| Handilsskúlar | 1 | 1 | | |
| Studentaskúlar | 1 | 1 | | |
| Byggifelag | 1 | 1 | | |
| Banki | 1 | 1 | | |
| **Tilsamans** | **62** | **49** | **12** | **1** |

**Klagur endaliga avgreiddar í 2013 (talva 3)**



**Klagur avvístar í 2013**

Í 2013 vóru 49 klagur avvístar av ymiskum orsøkum, harav 5 klagur frá undanfarnu árum. Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

Talva 4

| ***Avvísingarorsøk:*** | ***Klagur*** |
|---|---|
| Innkomin ov seint | 1 |
| Kærumøguleiki ikki troyttur | 13 |
| Ikki grundarlag fyri víðari kanningum | 26 |
| Uttanfyri heimildarøki | 5 |
| Afturkallað | 4 |
| **Tilsamans** | **49** |

**Klagur avvístar í 2013 býttar eftir avvísingarorsøk (talva 4)**



**Viðgjørdar klagur í 2013 býttar á málsøki**

Tey málini, sum vóru endaliga viðgjørd í 2013, kunnu býtast upp eftir málsøki á henda hátt:

Talva 5

| *Málsøki* | *Klagur* |
|---|---|
| Starvsfólkamál | 8 |
| Eftirlønarmál | 2 |
| Heilsumál | 1 |
| Almannamál | 13 |
| Skattur v.m. | 2 |
| Undirvísing, gransking v.m. | 2 |
| Kommunumál | 1 |
| Fiskivinnumál | 1 |
| Byggimál, búnaðarmál, umhvørvi v.m. | 3 |
| Innlit | 12 |
| Barnaverndarmál | 3 |
| Fjølmiðlamál | 1 |
| Ógegni | 1 |
| Rentustuðul | 2 |
| Arbeiðsmarknaðarmál | 1 |
| Ymiskt | 9 |
| **Tilsamans** | **62** |

**Klagur viðgjørdar í 2013 býttar á málsøki (talva 5)**



## Innkomnar klagur 2001-2013




**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av viðgjørdum klagum**
Í teimum 12 endaliga viðgjørdu klagunum í 2013, har álit varð skrivað, hevur miðal viðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

Talva 6

***Viðgerðartíð í miðal:***

| | |
|---|---|
| Aftan á partshoyring | 5 mðr. 24 dagar |
| Samlað | 8 mðr. 21 dagar |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av avvístum klagum**
Í teimum 49 avvístu klagunum hevur miðalviðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

Talva 7

***Viðgerðartíð í miðal:***

| | |
|---|---|
| Aftan á partshoyring | 5 dagar |
| Samlað | 28 dagar |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av bæði viðgjørdum og avvístum klagum**

Fyri allar klagurnar, tvs. bæði avvístar og endaliga viðgjørdar klagur, hevur málsviðgerðartíðin í miðal verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

Talva 8

| | Viðgerðartíð aftan á partshoyring | Viðgerðartíð tilsamans |
|---|---|---|
| **Klagur** | | |
| Málsviðgerðartíð í miðal: | 1 mðr. 8 dagar | 2 mðr. 12 dagar |

## Sammetingar 2011, 2012 og 2013

### Innkomnar klagur m.v.




### Avvísingarorsøk



## Innkomnar og viðgjørdar klagur býttar á málsøki




## Klagur um avgerðir, málsviðgerð og atburð



**Innkomnar klagur býttar á áðalráðini, stovnar undir teimum og kommunur**



# *IV. Samandráttir – álit*

**Álit viðvíkjandi klagu um grannabyggiloyvi**
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um avgerð hjá Kærunevndini í lendismálum at avvísa eina kæru um eitt grannabyggiloyvi. Klagarin seldi ognina, meðan málið var til viðgerðar í Kærunevndini, og tók Kærunevndin síðani avgerð um, at kærarin ikki longur var at meta sum partur í málinum.

Høvuðsendamálið við einari byggisamtykt og teimum treytum, sum har verða settar, er at tryggja dygdina og trygdina í tí, sum bygt verður, umframt at grannarnir skulu kenna treytirnar, sum eru galdandi í teirra øki, og sum grannarnir harvið eisini mugu tola, tá bygt verður í økinum. Frávik frá byggisamtyktunum kunnu eisini hava fíggjarligan áhuga fyri grannarnar, alt eftir hvussu inntrivandi tey eru, tí at hetta kann ganga útyvir teirra nýtslu av ognini og møguliga eisini søluvirði.

Umboðsmaðurin metti, at klagarin einans hevði fíggjarligan áhuga í málinum, eftir at hann hevði selt ognina. Av tí at onki er, sum bendir á, at ásetingarnar í byggisamtyktini burtur av skulu verja fíggjarlig áhugamál, hevði umboðsmaðurin onki at viðmerkja til, at Kærunevndin í lendismálum valdi at avvísa kæruna. (j. nr. 201100046)

**Álit viðvíkjandi klagu um skikkaða eftirløn hjá tænastumanni**
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um manglandi realitetsviðgerð av einum máli um skikkaða eftirløn.

Umboðsmaðurin metti tað ikki vera rímiligt, at ein borgari skal bøta fyri, at myndugleikar ikki vita, hvussu slík mál skulu viðgerast. Hóast Lønardeildin í 2008 hevði ásannað, at neyðugt var við eini mannagongd um viðgerð av málum um skikkaða eftirløn, var ongin mannagongd gjørd. Umboðsmaðurin helt tað vera átaluvert, at Lønardeildin ikki hevði gjørt hesa mannagongd og heitti á Lønardeildina um at taka

málið hjá klagaranum til viðgerðar og lata seg frætta, tá avgerð var tikin í málinum. (j. nr. 201200015)

Við skrivi, dagfest 6. mai 2014, boðaði Fíggjarmálaráðið umboðsmanninum frá, at niðurstøðu umboðsmansins er tikin til eftirtektar, og at gongd er í málinum. Fíggjarmálaráðið hevur eisini boðað frá, at arbeitt verður við at gera mannagongdir um viðgerð av málum, tá tænastumenn verða sagdir úr starvi vegna sjúku.

**Álit viðvíkjandi klagu um handfaringina hjá Tórshavnar og Tvøroyrar kommunu av innlitsáheitanum hjá Kringvarpi Føroya**

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um handfaringina hjá Tórshavnar kommunu og Tvøroyrar kommunu av innlitsáheitanum hjá Kringvarpi Føroya í somu skjøl.

Umboðsmaðurin viðgjørdi m.a., hvørji skjøl eru fevnd av rættinum til innlit, 10 daga freistina í innlitslógini, á hvønn hátt innlit verður latið, og spurningin um gjald fyri avrit.

Samanumtikið helt umboðsmaðurin fleiri lið í handfaringini virka sum forðingar fyri rætti klagarans at fáa innlit í umbidnu skjølini. Umboðsmaðurin vísti serliga á, at Tvøroyrar kommuna í fyrstu atløgu noktaði fyri yvirhøvur at hava nøkur skjøl at geva innlit í, og at kommunan, tá hon loksins váttaði at hava skjølini, bað klagaran venda sær til Tórshavnar kommunu fyri at biðja um innlit, hóast kommunan hevði skyldu at viðgera áheitanina. Í handfaringini hjá Tórshavnar kommunu vísti umboðsmaðurin serliga á, at vantandi skráseting av skjølum, sum kommunan móttók frá Tvøroyrar kommunu, hevði við sær, at klagarin ongantíð fekk innlit í skjølini, umframt at umboðsmaðurin metti, at Tórshavnar kommuna kundi havt avgreitt innlitsáheitanina skjótari. (j. nr. 201200055)

**Álit viðvíkjandi noktandi svari upp á meirinnlit í frágreiðing frá fundi millum løgmann og danska forsætismálaráðharran**

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu frá Dimmalætting um, at Løgmansskrivstovan sýtti fyri at veita meirinnlit í frásøgnina frá einum

fundi millum løgmann og danska forsætismálaráðharran í november 2012, har m.a. ætlanin at niðurleggja Landsbankan varð umrødd.

Vísandi til, at Løgmansskrivstovan hevði viðgjørt umbønina um meirinnlit, og at avgerðin var grundað á lóglig atlit, helt umboðsmaðurin seg ikki kunna finnast at avgerðini hjá Løgmansskrivstovuni um ikki at veita Dimmalætting meirinnlit í umrøddu fundarfrásøgnina. (j. nr. 201300006)

**Álit viðvíkjandi klagu um málsviðgerðina hjá TAKS av eini umsókn um rentustuðul**

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um, hvussu TAKS viðgjørdi eina umsókn um rentustuðul.

Umboðsmaðurin helt, at málsviðgerðin hjá Taks í hesum máli hevði verið alt annað enn nøktandi. Serliga vísti Umboðsmaðurin á mannagongdini hjá TAKS í sambandi við, hvussu upplýsingar vórðu savnaðir, fyri ikki at hava hildið notatskylduna og fyri ikki at hava partshoyrt klagaran, áðrenn avgerð var tikin. Umboðsmaðurin gav TAKS eina átalu fyri handfaringina av málinum og heitti á TAKS um at broyta mannagongd í slíkum málum fyri at tryggja, at reglurnar um notatskyldu og partshoyring verða hildnar. (j. nr. 201100095)

**Álit um klagu um avgerð at leingja royndarverkætlanina fyri Mikladals skúla**

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um avgerð hjá Klaksvíkar kommunu at leingja royndarverkætlanina fyri Mikladals skúla.

Umboðsmaðurin staðfesti, at Mikladals skúli ikki í løtuni kann metast at vera ein sjálvstøðugur skúli við egnum skúlastýri, hóast skúlin ikki er niðurlagdur, umframt at ongin heimild var fyri at góðkenna eina royndar- og menningarskipan fyri skúlasamstarvið millum skúlan á Ziskatrøð og Mikladals skúla.

Umboðsmaðurin heitti tí á Klaksvíkar kommunu og Mentamálaráðið um skjótast gjørligt at fáa greiðu á viðurskiftunum viðvíkjandi skúlanum í Mikladali.

Samstundis heitti Umboðsmaðurin á Klaksvíkar kommunu um at finna eina nøktandi loysn fyri flutningi av næmingunum frá Trøllanesi og Mikladali til undirvísingina í Klaksvík. (j. nr. 201100092)

Tann 1. mai 2014 boðaði Klaksvíkar kommuna umboðsmanninum frá, at málið er tikið upp til nýggja viðgerð.

**Drál í máli um stuðul til tannviðgerð**

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um, at Almannaverkið drálaði við at taka eitt mál um stuðul til tannviðgerð til nýggja viðgerð, eftir at Kærunevndin í almanna- og heilsumálum hevði gjørt av, at Almannaverkið skuldi fáa til vega nýggjar upplýsingar og gera eina nýggja meting av málinum.

Umboðsmaðurin gav Almannaverkinum eina átalu fyri handfaringina av málinum. (j. nr. 201300051)

**Klaga um ógegni hjá formanninum í Kærunevndini í almanna- og heilsumálum**

Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um, at formaðurin í Kærunevndini í almanna- og heilsumálum var ógegnigur at viðgera eitt kærumál um rindan av barnapeningi.

Umboðsmaðurin metti ikki, at kærunevndarformaðurin var ógegnigur, men sambært § 6, stk. 3 í fyrisitingarlógini kann viðkomandi ikki sjálvur taka lut í viðgerðini av spurninginum um ógegni. Umboðsmaðurin metti tað tí vera sera óheppið, at kærunevndarformaðurin sjálvur var við til at avgera, um hann var ógegnigur og vísti á, at endamálið við júst reglunum um ógegni m.a. er at viðvirka til, at almenningurin kann hava álit á viðgerðini, sum fer fram hjá myndugleikunum. (j. nr. 201300028)

**Vantandi innlit í mál hjá Vinnumálaráðnum**
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um vantandi innlit í samskiftið millum nevndarlim í Vinnuframagrunninum og landsstýrismannin í Vinnumálum.

Av tí at einki var skrivað niður um samskiftið millum partarnar, viðgjørdi umboðsmaðurin spurningin um notatskyldu sambært innlitslógini. Av tí at umboðsmansviðgerðin fer fram á einum skrivligum grundarlagi, og at umboðsmaðurin út frá skjølunum í málinum ikki visti at siga, hvat innihaldið í samskiftinum snúði seg um, var onki grundarlag fyri at meta um, um talan var um upplýsingar, sum vóru av einum slíkum slag, at Vinnumálaráðið átti at skrivað niður innihaldið í samskiftinum.

Umboðsmaðurin heitti á Vinnumálaráðið um at hava notatskylduna í huga, tá ið upplýsingar ella fráboðanir koma til aðalráðið, herundir eisini hvat slag av upplýsingum talan er um, og um hesar eiga at verða skrivaðar niður í eitt mál. (j. nr. 201300043)

**Álit um kunningarskrivið um fjølmiðlapolitikkin hjá Almannaverkinum**
Umboðsmaðurin hevur viðgjørt, um Almannaverkið skerdi talufrælsið hjá starvsfólkunum, tá tað í mai 2013 kunnaði starvsfólkini um fjølmiðlapolitikkin.

Umboðsmaðurin hevði einki grundarlag fyri at siga, at endamálið við kunningini um fjølmiðlapolitikkin var at avmarka talufrælsið hjá starvsfólkunum. Kunningarskrivið kundi heldur ikki lesast sum eini boð um, at starvsfólk ikki høvdu rætt at úttala seg egna vegna.

Umboðsmaðurin segði tó ikki starvsfólkini ring fyri at misskilja kunningina, tí kunningin varð send út fáar dagar eftir, at ein heilsuhjálpari hevði úttalað seg um ætlaðu sparingarnar, uttan at Almannaverkið samstundis gjørdi greitt, at starvsfólk høvdu rætt at úttala seg egna vegna. (j. nr. 201300040)

*Sólja í Ólavsstovu,*
*umboðsmaður*



# V. Umboðsmaðurin fær fleiri heimildir á barnaøkinum

Tann 18. desember 2013 samtykti eitt samt løgting eina lógarbroyting, sum skal víðka heimildirnar hjá umboðsmanninum til at fevna um eitt serligt eftirlit við privatum stovnum o.ø., sum hava til uppgávu at taka sær av børnum og ungum.

Lógarbroytingin hevur somuleiðis við sær, at Løgtingsins umboðsmaður skal tryggja og hava eftirlit við, at ST-Barnasáttmálin verður implementeraður. Eisini skal umboðsmaðurin tryggja og hava eftirlit við rættindum hjá børnum, sum eru ásett í føroyskari lóggávu fyri at lúka skyldurnar hjá Føroyum sambært sáttmálanum.

**Avleiðingarnar av lógarbroytingini**
Lógarbroytingin viðførir ikki, at nøkur broyting verður gjørd í arbeiðshættinum hjá Løgtingsins umboðsmanni, og umboðsmaðurin fer framhaldandi at arbeiða við trimum sløgum av málum:

- At viðgera ítøkiligar klagur frá børnum ella vaksnum vegna børn
- At taka mál upp av egnum ávum
- At fremja eftirlitsvitjanir á stovnum v.m.

Tað verður somuleiðis ein av uppgávunum hjá umboðsmanninum at gera Løgting, landsstýri og bý- og bygdarráð varug við, um lóggávan ikki er í samsvari við Barnasáttmálan.

Uppgávurnar á økinum koma at verða røktar innan karmarnar á verandi lóg, t.v.s. at umboðsmaðurin fer at viðgera mál á barna- og ungdómsøkinum á sama grundarlagi sum í dag, og uppgávan verður eins og í øðrum málum at greiða myndugleikunum frá, um hesir eftir umboðsmansins fatan hava gjørt eitt mistak.

**Kann taka mál upp og fara á eftirlitsvitjanir**

Ítøkiliga fer eftirlitið at verða framt á tann hátt, at umboðsmaðurin viðger klagur um viðurskifti hjá børnum, tekur mál upp av egnum ávum, fer á eftirlitsvitjanir á m.a. stovnum, har børn eru, og við at gera løgting og landsstýri varug við, um lógir og fyrisitingarligar ásetingar ikki eru sambæriligar við barnarættindasáttmálan. Sambært galdandi lóg fevnir virksemi umboðsmansins í dag um almennu fyrisitingina og stovnar hennara. Umboðsmaðurin hevur tískil longu í dag heimild at viðgera klagur á barna- og ungdómsøkinum, eins og umboðsmaðurin kann fremja eftirlitsvitjanir á almennum stovnum, har børn eru.

Týdningarmesta broytingin í lógini er at geva umboðsmanninum heimild at fremja eftirlitsvitjanir á privatum stovnum og í fosturheimum. At neyðugt er við hesi heimild kemst av, at eisini einstakir stovnar og privat heim hava ábyrgd av børnum. Hetta er t.d. galdandi fyri friskúlar, bú- og umlættingarstovnar, sum eru privatir, og fosturfamiljur sambært barnaverndarlógini. Grundað á stóra talið av fosturfamiljum væntast umboðsmaðurin einans at brúka hesa heimild, um ein fosturfamilja hevur fleiri fosturbørn og tískil kann sigast at hava stovnslig eyðkenni.

**Heldur fram sum óheftur eftirlitsstovnur**

Eitt grundleggjandi eyðkenni við umboðsmansstovninum er, at hann virkar óheftur av øðrum myndugleikum og áhugamálum, og

umboðsmaðurin ger sjálvur av, hvørji mál hann tekur til viðgerðar. Uppgávurnar á økinum verða í stóran mun røktar innan karmarnar í galdandi lóg. Umboðsmaðurin fer framhaldandi at gera vart við síni sjónarmið umvegis niðurstøður og frágreiðingar eftir at hava viðgjørt ítøkiligar klagur ella hava verið á eini eftirlitsvitjan. Tað verður ikki uppgávan hjá Løgtingsins umboðsmanni at meta um og vísa á meira almenn viðurskifti í samfelagnum um liviumstøður hjá børnum og tey tilboð, sum samfelagið hevur at bjóða børnum og ungum. Tað verður heldur ikki uppgávan hjá umboðsmanninum at gera viðmerkingar til lógaruppskot.

**Skal virka yrkisliga og fakliga**

ST hevur gjørt vart við, at avgerandi er, at eftirlitið við barnarættindasáttmálanum er óheft og virkar yrkisliga, soleiðis at arbeiðið byggir á fakliga ástøðiliga vitan. Umboðsmaðurin hevur ikki serligan fakkunnleika viðvíkjandi børnum og viðurskiftum teirra, og tískil verður eftir tørvi neyðugt eisini at hava fólk við barnasakkønari vitan við á eftirlitsvitjanir at meta um tilboðini, sum børnini fáa, og til at samskifta við børn, sum venda sær til umboðsmannin. Somuleiðis verður neyðugt at gera nakað burtur úr at kunna almenning og serliga børn og ung um møguleikarnar at klaga til umboðsmannin, og hvat umboðsmaðurin kann gera fyri at hjálpa klagarunum. Harumframt verður neyðugt at førleikamenna starvsfólk, tí hetta er eitt heilt nýtt fakøki, sum stovnurin skal viðgera.

**Tekur eisini mál upp av sínum eintingum**

Sambært § 6, stk. 5 í galdandi lóg kann umboðsmaðurin sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi. Hendan møguleikan hevur umboðsmaðurin brúkt, um eitt mál hevur verið mett at vera prinsipielt, ella tí at grundleggjandi mistøk eru framd. Orsøkin til, at eitt mál verður tikið upp av egnum ávum, kann vera almenn umrøða, men tað er eisini komið fyri, at umboðsmaðurin hevur gjørt av at taka eitt mál til viðgerðar, hóast vanliga klagufreistin, sum er eitt ár, var farin, tá klagan varð latin umboðsmanninum.

Sum dømi um mál, sum umboðsmaðurin hevur tikið upp av egnum

ávum, kunnu nevnast álit viðvíkjandi avgerð hjá Mentamálaráðnum at krevja skjøl aftur, sum innlit varð givið í sambært innlitslógini (200600098), álit viðvíkjandi klagu um setan av brunaumsjónarmanni í Tvøroyrar sløkkiliði (200700009), frágreiðing um avgerðir at løggilda grannskoðarar (200900041) og álit um kunningarskrivið um fjølmiðlapolitikkin hjá Almannaverkinum (201300040).

Umboðsmaðurin hevur sum lið í sínum virksemi í tveimum førum kannað viðgerðina hjá Almannaverkinum av útvaldum málsøkjum. Í 2005 kannaði umboðsmaðurin viðgerðina av 70 málum, har søkt varð um fyritíðarpensjón, sjúkradagpening og hjálpartól (200500059). Í 2008 varð henda kanning fylgd upp við eini nýggjari kanning um viðgerðina av 10 málum um fyritíðarpensjón og 15 endurbúgvingarmálum (200700061). Við tílíkum kanningum er í størri mun møguligt at finna fram til skipanarligar feilir í viðgerðini hjá myndugleikanum, enn tá umboðsmaðurin kannar eitt einstakt mál, sum klagað er um. Slíkar kanningar geva eisini umboðsmanninum eitt betri grundarlag at mæla til og ráðgeva um møgulig tiltøk, sum kunnu betra mannagongdirnar og málsviðgerðina hjá myndugleikanum, skuldi tað verið neyðugt. Í løtuni kannar umboðsmaðurin, hvussu aðalráð handfara mál um alment innlit. Við uppskotinum verður hesin kanningarháttur lógarfestur.

**Vitja fleiri stovnar**

Eftirlitsvitjanir eru eisini ein partur av virksemi umboðsmansins. Kjarnuøkið fyri tílíkum vitjanum hava higartil verið stovnar, sum hýsa bólkum í samfelagnum, sum hava ringt við at koma til orðanna. Umboðsmaðurin hevur skrivað frágreiðingar frá eftirlitsvitjanum á Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum (200200039), í sambýlunum Bóndaheygi 14 í Tórshavn (200700007), á Mýruni 4 og 6 í Hoyvík (201200026) og sambýlunum á Traðarvegi og undir Fobbakletti í Sandavági (201200013). Við lógarbroytingini verður hesin kanningarháttur nú lógarfestur.

**Barnaøkið økir um virksemið**
Ein av fortreytunum fyri óheftni umboðsmansins er, at játtanin á fíggjarlógini er so mikið rúmsátt, at hendan ikki avmarkar virksemið hjá umboðsmanninum á ein slíkan hátt, at mál ikki verða tikin til viðgerðar.

Umboðsmaðurin skal hava eftirlitið á barna- og ungdómsøkinum, tað merkir, at umboðsmaðurin í mun til í dag fær eina lógarásetta, bundna uppgávu. Umboðsmaðurin hevur tískil skyldu at raðfesta júst hetta økið, umframt at øll onnur mál og uppgávur sum higartil skulu røkjast. Hetta hevur við sær, at umboðsmansstovnurin hevur tørv á at seta ein løgfrøðiligan ráðgeva aftrat teimum tveimum, sum í dag starvast hjá Løgtingsins umboðsmanni.

**Nýggja heimasíðu og kunningartilfar**
Fyri at børn og ung kunnu gerast varug við, at møguleiki verður at klaga til umboðsmannin, verður neyðugt at gera nýggja heimasíðu, sum, umframt at lýsa virksemið hjá umboðsmanninum, eisini verður barnavinarlig, eins og tað verður neyðugt at gera kunningartilfar, sum er serliga ætlað børnum og ungum.

*Birta Biskopstø, ráðgevi*



# VI. At halda seg kenna

> *„Umboðsmaðurin helt tað vera ein álvarsaman feil í viðgerðini hjá setanarnevndini, at hon ikki útvegaði sær upplýsingar um starvið frá Løgmansskrivstovuni, sum hevði neyðuga kunnleikan og innliti í, hvørjar uppgávur liggja í starvinum, og hvørjar treytir tann, sum verður settur í starvið, skal lúka. ... Tað var somuleiðis ein álvarsamur feilur, at setanarnevndin ikki útvegaði sær eitt ummæli av klagaranum frá løgmansstjóranum, sum var tann einasti, sum hevði neyðugu vitanina um og kundi úttala seg um, hvussu klagarin hevði roynst í starvinum.“ (brot úr áliti frá umboðsmanninum j. nr. 200900001)*

**Ábyrgdin liggur hjá myndugleikanum**

Almennir myndugleikar taka dagliga nógvar avgerðir um viðurskifti, sum á ymiskan hátt ávirka borgaran. Sambært fyrisitingarrættinum hava myndugleikarnir skyldu at kanna og upplýsa eitt mál til fulnar, áðrenn ein fyrisitingarlig avgerð verður tikin. Upplýsingarskyldan er ein sokallað garantiregla, sum skal tryggja, at myndugleikin tekur avgerð á røttum og lógligum grundarlagi. Reglurnar um partshoyring

í fyrisitingarlógini eru eins og upplýsingarskyldan ein sokallað garantiregla, ið skal tryggja, at avgerðir verða tiknar á einum nøktandi og fullgóðum grundarlagi.

**Innsavning av upplýsingum**

Upplýsingarskyldan er áløgd myndugleikum, sum í sambandi við, at fyrisitingarligar avgerðir skulu takast, hava eina skyldu at tryggja, at eitt mál er upplýst til fulnar, bæði í mun til lóggávuna og tey faktisku viðurskiftini og umstøðurnar annars í málinum.

Summi mál byrja við, at myndugleikin tekur tey upp. Dømi um hetta kunnu vera starvsfólkamál, her undir starvssetan, viðgerð av málum viðvíkjandi starvsfólkum, meðan tey eru í starvi, og uppsagnarmál.

Onnur mál kunnu byrja við eini umsókn. Tá er tað í útgangsstøðinum umsøkjarin sjálvur, sum hevur skyldu til at upplýsa málið. Ivast myndugleikin um upplýsingarnar í málinum eru rættar, ella metir myndugleikin, at upplýsingar ikki eru fullfíggjaðir, skal myndugleikin eftirkanna hetta og sjálvur útvega sær neyðugar upplýsingar fyri at lýsa málið til fulnar.

Eitt grundleggjandi krav er, at tá talan er um innsavnan av upplýsingum, skal talan vera um neyðugar, viðkomandi ella týðandi upplýsingar fyri viðgerðina av málinum. Hetta ger seg serliga galdandi, tá talan er um at útvega sær trúnaðar- ella persónsupplýsingar.

Hættirnir at innsavna upplýsingar kunnu vera ymiskir, alt eftir hvat slag av upplýsingum talan er um og frá hvørjum, tað verið seg myndugleika, virkjum, borgarum og øðrum.

**Gjøgnum eygleiðing**

Í áliti frá umboðsmanninum j. nr. 201100095 viðgjørdi umboðsmaðurin eina klagu um viðgerðina hjá TAKS av einari umsókn um rentustuðul. Sambært upplýsingunum, sum vóru í málinum, búði klagarin í einari aðrari kommunu, enn arbeiðsstaðið var. Av tí at klagarin búði í barndómsheiminum mitt í viku, metti TAKS, at bústaður hansara í tí kommunu, hann var skrásettur at búgva í, bert var ein frítíðarbústaður,

sum ikki gav honum rætt til rentustuðul. Metingin hjá TAKS um veruliga bústaðin hjá klagaranum var grundað á upplýsingar, sum myndugleikin hevði fingið til vega gjøgnum millum annað eygleiðingar og frá nærumhvørvinum.

Millum annað setti TAKS seg í samband við borgarstjóran á tí staðnum, har barndómsheimið hjá klagaranum var, fyri at innheinta upplýsingar um bústaðarviðurskiftini. Umboðsmaðurin dugdi ikki at síggja, at hetta skuldi verið neyðugt, tí TAKS hevur beinleiðis atgongd til fólkayvirlitsskránna hjá kommunum, eins og umboðsmaðurin metti, at ein tílík áheitan til borgarstjóran kundi geva ta fatan, at TAKS hevði biðið borgarstjóran sum privatpersón úttala seg um bústaðarviðurskiftini hjá klagaranum.

Umboðsmaðurin vísti í álitinum á, at tá ið ein myndugleiki hevur eina serliga vitan um ein borgara frá nærumhvørvinum, kann hetta vera eitt av fleiri atlitum, ið dentur kann verða lagdur á, tá mál skulu lýsast. Tað hevur tó avgerandi týdning, at myndugleikin virðir tær ásetingar, ið eru í fyrisitingarrættinum, tá slíkar upplýsingar skulu savnast og vektast. Umframt sakligheit, áliggur tað myndugleikanum ein serlig skylda at fara varisliga fram, tá talan er um at savna upplýsingar um borgarar gjøgnum eygleiðing, serliga tá ið talan er um smápláss, har øll – borgari og myndugleikar – „halda seg kenna“ faktiskar umstøður hjá hvørjum øðrum.

Hóast TAKS í hesum máli hevði upplýsingar, sum kunnu metast at hava stóran týdning fyri avgerðina, og sum ikki vóru til fyrimuns fyri klagaran, gav myndugleikin ikki klagaranum høvi til at koma við sínum viðmerkingum, áðrenn TAKS tók avgerð í málinum um rentustuðul.

**Munnlig innheintan av upplýsingum og notatskylda**
Í áliti frá umboðsmanninum j. nr. 200400069 viðgjørdi umboðsmaðurin eina klagu um setan av leiðara fyri Frítíðarskúlan á Tvøroyri. Tvinnar umsóknir vóru til avloysarastarvið í Frítíðarskúlanum á Tvøroyri. Annar umsøkjarin var útbúgvin lærari og hin umsøkjarin var útbúgvin námsfrøðingur. Hóast bert annar umsøkjarin kundi koma upp á tal

til starvið, tí hon var útbúgvin námsfrøðingur við arbeiðsroyndum og hevði eitt gott viðmæli frá leiðaranum á stovninum, tók kommunan eftir tilmæli frá sosialu nevnd avgerð um at seta læraran í starvið. Einki er sagt um orsøkina til hetta, hvørki í tilmælinum frá sosialu nevnd ella í gerðabókini hjá kommununi fyri hendan fundin. Einki skjalatilfar var í málinum, sum lýsir, hvørja viðgerð umsóknirnar hava fingið.

Í einum notati frá formanninum og næstformanninum í sosialu nevnd, sum varð skrivað stívliga 5 vikur aftaná, at setanin varð framd, verður greitt frá, at avgerð teirra var grundað á, hvussu námsfrøðingurin skal hava uppført seg á einum fundi í barnagarðinum, har hon luttók sum foreldur. Umboðsmaðurin staðfesti í álitinum, at eingin dokumentatión var fyri hesum uppáhaldum, sum heldur ikki eru nærri útgreinað. Víðari verður sagt í hesum notati, at leiðarar á øðrum kommunalum stovnum eisini eru spurdir til ráðs, og at hesir í flestu førum ikki hava hildið námsfrøðingin vera egnaðan til leiðarastarvið.

Umboðsmaðurin vísti í álitið fyri tað fyrsta á, at kommunan hevði skyldu til, tá møgulig ummæli vóru fingin til vega frá øðrum stovnsleiðarum, at gera notat frá hesum samrøðum. Eingi slík notat vóru í málinum, hvørki viðvíkjandi hvønn tosað hevði verið við, ella hvat hesi møguliga høvdu sagt.

Fyri tað næsta hevði kommunan skyldu til at kunna námsfrøðingin um møgulig ummæli, sum ikki vóru til fyrimuns fyri hana, og at geva henni høvi til at koma við einum ummæli av hesum, áðrenn avgerð varð tikin í málinum. Hetta var als ikki gjørt – hvørki viðvíkjandi teimum útsøgnum, sum teir báðir limirnir í sosialu nevnd søgdu seg hava fingið frá øðrum stovnsleiðarum ella tí, sum skal vera hent á umrødda fundinum í barnagarðinum.

**Ikki allar upplýsingar skulu noterast**
Hóast tað er ein meginregla, at myndugleikin hevur skyldu til at notera allar upplýsingar, sum hesin munnliga ella á annan hátt tekur ímóti viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, ið hava týdning fyri avgerðina í málum, eru tað tó ikki allar upplýsingar, ið skulu noterast

í mál. Í áliti frá umboðsmanninum j. nr. 200500069 varð niðurstøða gjørd viðvíkjandi klagu um viðgerðina hjá Arbeiðsloysisskipanini av setan av starvsfólki. Í einum telefonnotati hevði Arbeiðsloysisskipanin noterað, at klagarin sambært upplýsingunum frá Toll- og Skattstovu Føroya skal vera ein „Ebeneser-maður burturav". Umboðsmaðurin dugir ikki at síggja, at trúarviðurskifti skulu hava nakran týdning yvirhøvur fyri eitt starv sum málsviðgeri hjá Arbeiðsloysisskipanini. Hendan upplýsing kann tí einans vera við til at ávirka avgerðina á ósakligan hátt, og átti tí ikki at verið noterað. Av tí, at ongar ábendingar vóru um, at hetta hevði ávirkað avgerðina hjá Arbeiðsloysisskipanini, gjørdi umboðsmaðurin kortini ikki meira við hendan spurning.

**At síggja burtur frá upplýsingum**

Í áliti frá umboðsmanninum j. nr. 200900001 viðgjørdi umboðsmaðurin eina klagu um handfaringina av setanini av einum deildarstjórastarvi á Løgmansskrivstovuni. Undir viðgerðini av málinum valdi setanarnevndin at síggja burtur frá skjølunum í málinum hjá Løgmansskrivstovuni, og tá setanarprofilur skuldi gerast, vendi nevndin sær til ein fyrrverandi leiðara í lýsta starvinum. Uttanríkisráðið hevur greitt frá, at orsøkin til, at sæð varð burtur frá skjølunum hjá Løgmansskrivstovuni var, at starvsfólkini á Løgmansskrivstovuni vóru ógegnig at viðgera málið. Í starvslýsingini varð sagt, at tað var ein fyrimunur, at umsøkjari hevði arbeiðsroyndir innan tær uppgávur og øki, sum lógu í starvinum. Hóast hetta kannaði setanarnevndin ikki, hvørjar royndir Løgmansskrivstovan hevði av viðkomandi, sum tá hevði røkt starvið í stívliga eitt ár. Umboðsmaðurin metti, at eingin ivi kundi vera um, at luttøkan hjá løgmansstjóranum eisini í hesum føri er av stórum týdningi fyri at upplýsa málið. Løgmansstjórin var sum stjóri hjá viðkomandi tann einasta, sum hevði neyðugu vitanina um og kundi úttala seg um, hvussu hon hevði roynst í starvinum. Umboðsmaðurin metti tað vera ein álvarsaman feil, at eitt slíkt ummæli ikki var útvegað.

**Samanumtikið**

Í einum lítlum samfelag sum okkara, har tey flestu halda seg kenna hvønn annan, skal upplýsingarskyldan hjá myndugleikum eins og partshoyringsreglurnar vera fremst í huganum hjá myndugleikapersónum, sum taka avgerðir. Týdningarmikið er, at upplýsingar verða innsavnaðar

á lógligan hátt, eins og einans neyðugar, viðkomandi ella týðandi upplýsingar verða innsavnaðar. Saman við upplýsingarskylduni er eisini skyldan hjá myndugleikanum at kunna borgarin um møguligar upplýsingar, her undir eisini ummæli, sum ikki eru til fyrimuns fyri hann, og at geva honum høvi til at koma við einum ummæli til hesar upplýsingar, áðrenn avgerð varð tikin í málinum.

*Jóhanna Arge, ráðgevi*



# *VII. Grundgevingar fyri at avvísa klagur*

Av teimum 66 klagunum, sum umboðsmaðurin fekk í 2013, endaðu 44 við, at umboðsmaðurin ikki gjørdi meira við klaguna. Í hesi grein verður greitt frá orsøkunum til, at umboðsmaðurin, tá hann hevur kannað og umhugsað málið, ikki kann viðgera eina klagu ella ger av ikki at gera meira við klagur. Hetta verður fyrst og fremst gjørt við støði í teimum klagum, sum umboðsmaðurin hevur avvíst at viðgera í 2013.

**Uttan fyri heimildarøkið**

Virksemi umboðsmansins fevnir um fyrisitingarnar hjá landinum og kommununum og feløg, stovnar og felagsskapir, ið verða roknað við til almennu fyrisitingina. Tað vil siga, at umboðsmaðurin kannar avgerðir og viðferðir, sum borgarar og mál fáa frá útinnandi valdinum.

Umboðsmaðurin kann ikki kanna privatar fyritøkur, privatar stovnar ella almenn partafeløg, og umboðsmaðurin ger tí einki við klagur

um viðurskifti við t.d. peningastovnar, byggisjusk hjá byggifyritøkum ella atferðina hjá Atlantsflog ella Føroya Tele.

Danskir fyrisitingarmyndugleikar í Føroyum sum t.d. Føroya Landfúti verða ikki roknaðir við til føroysku fyrisitingina, og tískil kann umboðsmaðurin ikki viðgera klagur um hesar myndugleikar.

Virksemið hjá umboðsmanninum umfatar heldur ikki dómstólarnar. Hetta kemst helst av, at tað er ikki sambæriligt við valdsbýtið, at umboðsmaðurin, sum lóggevandi valdið hevur tilnevnt, kannar úrskurðir hjá dømandi valdinum. Í einstøkum førum hevur umboðsmaðurin avvíst at viðgera klagur um mál, sum eru løgd fyri rættin, ella sum lítil ivi er um, verða løgd fyri rættin.

Onki forðar umboðsmanninum í at kanna mál, har løgmaður og landsstýrisfólk hava verið við. Teirri embætisførsla sum ovastu fyrisitingarligu leiðarar verður tá kannað og ikki teirra virki sum politikarar. Umboðsmaðurin hevur ikki eftirlit við løgtinginum og kann ikki kanna mál, sum viðvíkja viðurskiftum millum løgmann/landsstýrisfólk og løgtingið. Við hesi grundgeving avvísti umboðsmaðurin undanfarna ár at kanna eina klagu um, at løgmaður skuldi havt sagt ósatt fyri løgtinginum, og at hann var vitandi um, at týðandi upplýsingar ikki vórðu latnar løgtinginum. Tílík mál má løgtingið ella landsstýrismálanevndin taka støðu til.

**Navnleysar klagur og viðgerð í trúnaði**
Í umboðsmanslógini er ásett, at klagari skal navngeva seg. Seinastu árini hava tveir klagarar av ótta fyri starvssetanarligum avleiðingum heitt á umboðsmannin um at fjala samleika teirra fyri myndugleikanum, sum klagað varð um. Onnur klagan snúði seg um eina almenna starvssetan. Av tí, at tað ikki bar til at eyðmerkja klagaran, metti umboðsmaðurin klaguna sum ónavngivna, sum hann tískil ikki kundi viðgera. Í hinum førinum boðaði umboðsmaðurin klagaranum frá, at kravið um, at klagarin skal navngeva seg, hevur við sær, at umboðsmaðurin kann ikki dylja navnið á klagarum fyri myndugleikunum. Haraftrat er ásett í lógini, at myndugleikin skal kunnast um klaguna, og áðrenn umboðsmaðurin ger sína niðurstøðu, skal myndugleikin hava høvi

at greiða frá viðgerðini av málinum. Fyri at kunna gera hetta má myndugleikin vita, hvat mál klagan snýr seg um, tvs. eisini hvør klagarin er, og at hann hevur vent sær til umboðsmannin. Vanlig mannagongd er haraftrat at senda myndugleikanum møguligar viðmerkingar, sum klagarin hevur til frágreiðingina.

**Klagan komin ov seint**

Freistin at klaga til umboðsmannin er eitt ár. Verður klagað um eina avgerð, skal avgerðin vera tikin seinasta árið. Flestu klagurnar til umboðsmannin eru rættstundis. Seinastu fimm árini hevur umboðsmaðurin í 11 førum avvíst at viðgera eina klagu grundað á, at hon er innkomin ov seint.

**Kærumøguleiki ikki troyttur**

Klagur um avgerðir, ið ein møguligur hægri fyrisitingarmyndugleiki kann broyta, kunnu ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Ein avgerð hjá t.d. Almannaverkinum kann í flestu førum kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, og í tílíkum førum sendir umboðsmaðurin javnan kærumyndugleikanum klaguna við áheitan um at viðgera hana sum eina kæru. Eftir at kærumyndugleikin hevur tikið endaliga avgerð í málinum, kann málið klagast til umboðsmannin.

Fyri at umboðsmaðurin kann viðgera innihaldsligar spurningar í einum máli, skulu bæði viðgerandi myndugleikin og ein møguligur kærumyndugleiki hava tikið endaliga støðu til málið. Umboðsmaðurin kann ikki heita á myndugleikar um at steðga á við viðgerðini av einum máli. Umboðsmaðurin hevur tí avvíst at taka eina klagu til viðgerðar, sum snúði seg um, at klagarin óttaðist, at ein kommuna fór at veita alment innlit í upplýsingar um klagaran, sum klagarin ikki metti vóru fevndar av rættinum til innlit.

Førir ein klagari fram nýggj sjónarmið, sum klagaði myndugleikin ikki hevur havt høvi at taka støðu til undir málsviðgerðini, sendir umboðsmaðurin vanliga í fyrsta umfari hendan partin av klaguni til myndugleikan at viðgera. Hetta verður gjørt, tí umboðsmaðurin kann ikki finnast at einum myndugleika fyri nakað, hann ikki hevur havt

høvi at viðgera. Í øðrum førum er klagan send kommunala eftirlitsmyndugleikanum, tí umboðsmaðurin hevur mett, at myndugleikin í fyrstu atløgu eigur at taka støðu til málið.

Er klagarin ikki vegleiddur um, at ein avgerð kann kærast til hægri myndugleika, heitir umboðsmaðurin vanliga á myndugleikan um at vegleiða borgaran um, hvønn myndugleika avgerðin kann kærast til. Er eingin ivi um, hvør kærumyndugleikin er, sendir umboðsmaðurin týðum klaguna beinleiðis til kærumyndugleikan til viðgerðar. Viðmerkt verður samstundis, at ein møgulig lógarásett kærufreist eftir umboðsmansins fatan fer ikki at telja, fyrr enn borgarin er vegleiddur um kærumøguleikan.

Verður avgerðin hjá einum undirskipaðum myndugleika ikki kærd til yvirskipaða myndugleikan innan ásettu kærufreistina, er ongin møguleiki fyri eini umboðsmansviðgerð av málinum.

Reglan um, at kærumøguleikin skal vera troyttur, forðar tó ikki fyri, at spurningar um t.d. málsviðgerð verða lagdir fyri umboðsmannin, hóast hesir eisini kunnu viðgerast av viðkomandi hægri myndugleika. Hesa heimild nýtir umboðsmaðurin vanliga til at viðgera klagur um drúgva viðgerðartíð og vantandi svar frá myndugleikunum uppá t.d. innlitsáheitanir og umsóknir um sosialar veitingar.

**Ikki grundarlag fyri víðari kanningum**
§ 6, stk. 4 ásetir, at umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í einum máli, sum klagað verður um. Umboðsmaðurin avvísir flest klagur við heimild í hesi áseting. At grundarlag ikki er fyri at kanna eitt mál nærri, merkir tó ikki, at klagurnar byggja á misskiljingar ella eru ógrundaðar. Grundgevingarnar eru nógvar og ymiskar.

Viðgerðin hjá umboðsmanninum fer fram á einum skrivligum grundarlag, og ein umboðsmansviðgerð er t.d. ikki egnað at greiða próvspurningar. Av tí, at umboðsmaðurin ikki avhoyrir vitni, kann umboðsmaðurin t.d. heldur ikki taka dagar ímillum tað, sum klagari og myndugleiki upplýsa, um hetta ikki samsvarar. Umboðsmaðurin

hevur tí m.a. avvíst at viðgera eina klagu um, hvørt klagarin hevur móttikið eitt bræv frá myndugleikanum ella ikki. Myndugleikin hevði avrit av skrivinum í sínari varðveitslu, og brævið var ikki komið retur. Ein endalig staðfesting av spurninginum kundi ikki fremjast innan karmarnar av eini umboðsmansviðgerð, men mátti leggjast fyri dómsvaldið.

Umboðsmaðurin kann bert í avmarkaðan mun taka støðu til avgerðir, sum heilt ella partvíst byggja á serligan fakkunnleika. Ein kanning av metingum hjá t.d. læknum krevur ein fakkunnleika, sum umboðsmaðurin ikki hevur. Umboðsmaðurin metir seg tí t.d. ikki kunna seta spurnartekn við eina niðurstøðu um, at tað læknafakliga ikki var grundarlag fyri at ávísa ein borgara til eina ávísa viðgerð, ella taka støðu til, um sjúklingurin hevði fingið nøktandi viðgerð. Í tílíkum málum avmarkar umboðsmaðurin seg til at viðgera løgfrøðiligu spurningarnar, t.d. um málið er nóg væl upplýst.

Í einstøkum førum fær umboðsmaðurin klagur um málsviðgerðina í málum, sum eru avgreidd, og sum til fulnar ganga klagarunum á møti. Í slíkum førum fær umboðsmaðurin ikki hjálpt klagaranum við málinum. Hann hevur fingið fult viðhald, og í flestu førum metir umboðsmaðurin tað ikki tæna nøkrum endamáli at viðgera málið umaftur og finnast at einum myndugleika fyri mistøk og feilir, sum myndugleikin hevur ásannað og rættað. Í øðrum førum standa møgulig brot ikki mát við orkuna, sum skal nýtast til at kanna málið.

Tá klagað verður um drúgva viðgerðartíð av einum máli, kemur í fleiri førum beinanvegin gongd á málið, eftir at umboðsmaðurin hevur sent kláguna til ummælis. Er talan ikki um átaluvert drál, ella at málið er steðgað upp, verður klagan vanliga avvíst við teirri grundgeving, at gongd er komin á málið, og at umboðsmaðurin tískil ikki fær hjálpt klagaranum við málinum.

Drúgv viðgerðartíð av einum máli merkir ikki altíð, at gongd ikki er í málinum, ella at myndugleikin ikki arbeiðir við málinum. Hetta kann vera, tá søkt verður um eina almenna góðkenning av einum ella

øðrum slag, og málsviðgerðartilgongdin í støðum er at meta sum ein samráðing um treytir heldur enn vanliga málsviðgerð.

Boðar ein myndugleiki frá, at hann tekur viðgerðina av málinum uppaftur, tá hann hevur fingið klaguna til ummælis, fær klagarin boð um, at hann kann venda sær aftur til umboðsmannin, tá myndugleikin hevur tikið eina nýggja avgerð, um klagarin til ta tíð er ónøgdur við avgerðina.

Í øðrum føri hevur umboðsmaðurin fyribils avvíst eina klagu um fyrisitingina hjá einum myndugleika í einum ávísum málslagi, sum var reguleráð í kunngerð. Hetta komst ikki av, at umboðsmaðurin helt klaguna vera týdningarleysa, men at umboðsmaðurin metti, at aðalráðið, sum var yvirskipaður myndugleiki í mun til klagaða myndugleikan, átti at fáa høvi at kanna uppáhaldið og um neyðugt taka møgulig stig í málinum, áðrenn umboðsmaðurin tók støðu til at viðgera klaguna.

Onnur dømi um avvístar klagur kunnu vera, at umboðsmaðurin metir málið at vera ein samráðingarspurning millum løntakara og arbeiðsgevara, at málið er meldað til løgregluna o.o.

Myndugleikin, sum klagað verður um, verður vanliga kunnaður um grundgevingarnar hjá umboðsmanninum fyri ikki at viðgera eina klagu um teirra fyrisiting.

# *VIII. Skjøl*

## *Skjal 1*

**Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann**

**1. Partur**
**Umboðsmaðurin og Løgtingið**

**§ 1.** Løgtingið velur ein uttantingsmann fyri eitt 5 ára skeið at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.

*2. stk.* Doyr umboðsmaðurin í embætistíð síni ella er hann av øðrum orsøkum ikki førur fyri at røkja starv sítt, ger formansskapur Løgtingsins av, hvør skal røkja starvið, til Løgtingið velur ein nýggjan umboðsmann. Tað sama er galdandi, um umboðsmaðurin biður um at verða loystur úr starvi, ella um Løgtingið loysir hann úr starvi smb. stk. 3.

*3. stk.* Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnunum loysa hendan úr starvi.

**§ 2.** Umboðsmaðurin, ið ikki kann sita á Løgtingi ella í kommunustýri, skal so vítt gjørligt hava løgfrøðiliga útbúgving.

**§ 3.** Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins. Annars er umboðsmaðurin í starvi sínum óheftur av Løgtinginum.

**2. Partur**
**Heimildir**

**§ 4.** Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu).

*2. stk.* Lógin er eisini galdandi fyri feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella lógini um almennar skráir.

*3. stk.* Í meting sínari av kommunalari umsiting skal umboðsmaðurin vísa atlit til tær serligu umstøður, kommunufyrisiting virkar undir.

*4.stk.* Interkommunalir felagsskapir eru undirlagdir virksemi umboðsmansins.

*5. stk.* Virksemi umboðsmansins fevnir ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.

**§ 5.** Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

**3. Partur**
**Kærumál og egin mál**

**§ 6.** Ein og hvør kann senda umboðs-

manninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir.

*2. stk.* Tann, ið klagar, skal navngeva seg í klaguni. Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.

*3. stk.* Klaga um avgerðir, ið møgulig-ur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hæg-ri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Freistin, ið er nevnd í 2. stk., skal í slíkum førum roknast frá tí degi, hægri myndugleikin tekur avgerð sína.

*4. stk.* Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.

*5. stk.*Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.

## 4. Partur
## Kanningar

**§ 7.** Ger umboðsmaðurin av at taka eina kæru til viðgerðar, skal hann beinanvegin kunna viðkomandi umsiting um innihaldið í kæruni, um ikki vandi er fyri, at hetta kann darva kanningini. Harumframt skal umsitingin biðjast um ummæli í málinum, áðrenn umboðsmaðurin tekur avgerð um at gera vart við meting sína av málinum smb. § 10, stk. 2. Umboðsmaðurin kann áseta tíðarfreist til ummæli.

**§ 8.** Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. Í slíkum førum eru reglurnar í rættargangslógini galdandi. Rættarfundirnir eru ikki almennir. Tann, ið klagan víðvíkur, hevur saman við hjáseta rætt at vera hjástaddur, meðan slík vitnisførsla fer fram.

*3. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

**§ 9.** Umboðsmaðurin hevur tagnarskyldu um tey viðurskifti, hann í virksemi sínum fær kunnleika til. Tagnarskyldan stendur við, eftir at umboðsmaðurin fer úr starvi, og fevnir eisini um starvsfólk á umboðsmansstovninum.

## 5. Partur
## Niðurstøður

**§ 10.** Kemur umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av einum av teimum í § 4 nevndu umsitingum, skal umboðsmaðurin boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og /ella kommunustýri frá hesum og koma við tilmæli til teirra.

*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum, og á annan hátt gera vart við meting sína av máli, hann hevur kannað.

*3. stk.* Umboðsmaðurin kann mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin, smb. rættargangslógini §§ 330 –336c, í málum, sum hava verið viðgjørd eftir hesi lóg.

**§ 11.** Umboðsmaðurin letur Løgtinginum ársfrágreiðing um arbeiðið sítt. Frágreiðingin verður almannakunngjørd áðrenn 1. juli.

*2. stk.* Boðar umboðsmaðurin Løgtinginum, landstýrismanni ella kommunustýri frá einum máli, ella tekur hann eitt mál við í ársfrágreiðing sína, skal hann upplýsa um, hvat viðkomandi hevur ført fram til verju sína.

**§ 12.** Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalari ella interkommunalari umsiting, skal umboðsmaðurin eisini boða viðkomandi kommunustýri frá.

**§ 13.** Um umboðsmaðurin krevur tað, kunnu dómstólarnir vísa frá sær privatmál móti umboðsmanninum vegna avgerðir, sum hann tekur við grundarlagið í hesi lóg.

## 6. Partur
## Lønar- og eftirlønarviðurskifti

**§ 14.** Lønarviðurskifti umboðsmansins, herundir eisini spurningin um eftirløn og bíðipening, verða ásett við løgtingslóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann ikki, uttan við loyvi Løgtingsins, vera í starvi hjá almennum ella privatum fyritøkum, virkjum ella stovnum.

*3. stk.* Møguligur spurningur um ógegni umboðsmansins í ávísari søk verður lagdur fyri formansskap Løgtingsins, sum, um mett verður, at talan er um ógegnið, útnevnir annan at viðgera hetta ávísa mál.

**§ 15.** Umboðsmaðurin kann krevja at verða loystur úr starvi við seks mánaða freist at galda frá seinasta degi í einum mánaði.

## 7. Partur
## Fyrisiting

**§ 16.** Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

**§ 17.** Tær útreiðslur, ið standast av umboðsmansstovninum, verða játtaðar á Løgtingsins fíggjarlóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin ger roknskap fyri virksemi stovnsins, hesin skal vera grannskoðaður av grannskoðara Løgtingsins.

## 8. Partur
## Ígildisreglur

**§ 18.** Henda lóg kemur í gildi 1. januar ár 2001.

*2. stk.* Klagur um viðurskifti í tíðarskeiðinum 1. januar 2000 og til henda lóg kemur í gildi, kunnu kortini leggjast fyri umboðsmannin til viðgerðar.

# *Skjal 2*

**Løgtingslóg nr. 157 frá 20. desember 2013 um broyting í løgtingslóg um løgtingsins umboðsmann**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 4, stk. 1 verður aftaná „(t.e. lands- og kommunalu)“ sett: „, og viðurskifti hjá børnum á privatum stovnum v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum“.

**2.** Í § 4, stk. 2 verður „almennar skrá-ir“ broytt til: „viðgerð av persóns-upplýsingum“.

**3.** Í § 6 verða sum stk. 6 og 7 sett: „*Stk. 6.* Umboðsmaðurin kann kanna viðgerðina hjá myndug-leikunum av útvaldum málum. *Stk. 7.* Umboðsmaðurin kann kanna allar stovnar, myndugleikar og tæn-astustøð, sum eru fevnd av virkis-økinum hjá umboðsmanninum.“

**4.** Í § 7, stk. 1 verður „kæru“ broytt til: „klagu“ og „kæruni“ broytt til: „klaguni“.

**5.** Í § 8 verður sum stk. 4 sett: „*Stk. 4.* Metir umboðsmaðurin tað vera neyðugt, kann hann uttan rættarúrskurð kanna privatar stovnar v.m., hvørs uppgávur bein-leiðis viðvíkja børnum, sbrt. § 4, stk. 1.“

**6.** Í § 12 verður sum stk. 2 sett: „*Stk. 2.* Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, um galdandi lógir og fyrisitingarligar ásetingar eru sambæriligar við altjóða skyldur at tryggja barnarættindi, herundir sáttmála Sameindu Tjóða um rætt-indi hjá børnum. Rakar umboðs-maðurin við lýti í hesum sambandi, skal umboðsmaðurin boða Løg-tingi og viðkomandi landsstýris-manni frá hesum. Er talan um lýti í ásetingum, ásettar av eini komm-unu, skal umboðsmaðurin boða viðkomandi kommunustýri frá.“

**§ 2**

*Stk. 1.* § 1, nr. 2-4 koma í gildi dagin eftir, at henda løgtingslóg er kunngjørd.
*Stk. 2.* § 1, nr. 1, 5 og 6 koma í gildi 1. oktober 2014.

# *Skjal 3*

**Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann**

**Hvønn og hvat kunnu tygum klaga um**

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við allari fyrisitingini undir heimastýrinum, tvs. bæði lands-, kommunalu og interkommunalu myndugleikunum.

Umboðsmaðurin kann viðgera klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum.

Tygum kunnu t.d. klaga um eina noktan av einari umsókn, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið og / ella framferðarháttin hjá embætisfólkunum.

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at myndugleikarnir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

Dómstólarnir, Løgtingið, feløg og privatir persónar eru ikki almennir fyrisitingarmyndugleikar. Tí kann umboðsmaðurin ikki viðgera klagur um hesi. Donsku myndugleikarnir, sum t.d. løgreglan, hoyra ikki undir heimastýrið. Tí kann umboðsmaðurin heldur ikki viðgera klagur um hesar.

Um tygum eru í iva um, hvørt tygum kunnu klaga til umboðsmannin um ein ávísan myndugleika, kunnu tygum altíð spyrja okkum.

**Hvussu kunnu tygum klaga**

Um tygum ynskja at klaga, skulu tygum skriva til umboðsmannin og greiða frá, **hvønn** og **hvat** tygum ynskja at klaga um. Um tygum hava latið onkran annan klaga tygara vegna, skulu tygum leggja eina undirskrivaða fulltrú við klaguni. Tað lættir um málsviðgerðina, um tygum senda møgulig viðkomandi skjøl (brøv frá tygum, svar frá myndugleikunum o.s.fr.) saman við klaguni. Á hendan hátt fáa tygum eisini ofta skjótari svar, tí umboðsmaðurin vanliga hevur tørv á at síggja hesi skjøl.

**Hvat kann umboðsmaðurin gera**

Um umboðsmaðurin eftir at hava kannað málið kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur viðkomandi viðhald, kann hann finnast at tí myndugleikanum, sum klagan snýr seg um. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Leggið til merkis, at umboðsmaðurin ikki sjálvur kann broyta eina avgerð. Uppgávan hjá umboðsmanninum er

sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.

Í hesum sambandi skulu tygum hava í huga, at umboðsmaðurin hevur avmarkaðar møguleikar fyri at taka støðu til avgerðir, ið eru grundaðar á reinar metingar ella avgerðir, har tað krevst ein serligur førleiki (t.d. læknaligur).

**Hvat hendir, tá umboðsmaðurin fær eina klagu**

Umboðsmaðurin hevur 3 møguleikar at svara eini klagu:

1. Klagan verður kannað nærri.
2. Klagan verður avvíst, tí at umboðsmaðurin ikki kann viðgera hana.
3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.

*1. Klagan verður kannað nærri.*
Heldur umboðsmaðurin, at ein klaga skal kannast nærri, sendir hann hana til viðkomandi myndugleika og biður um eina viðmerking. Samstundis biður hann eisini um at læna møgulig skjøl í málinum. Viðmerkingin frá myndugleikanum verður vanliga send viðkomandi, sum fær møguleika at gera sínar viðmerkingar.

Hann, ið hevur klagað, verður vanliga kunnaður um gongdina í málinum.

Tá myndugleikin og viðkomandi hava gjørt sínar viðmerkingar til málið, er hetta vanliga klárt til endaligu niðurstøðu umboðsmansins. Alt eftir, hvussu nógv mál eru til viðgerðar hjá umboðsmanninum samstundis, og hvussu skjótt myndugleikarnir svara umboðsmanninum, mugu tygum rokna við, at tað kann ganga umleið eitt hálvt ár, áðrenn málið er liðugt viðgjørt.

*2. Klagan verður avvíst.*
Løgtingið hevur í umboðsmanslógini (lóg nr. 60 frá 10. mai 2000) sett mark fyri, nær umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu:

„*Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum...*“ (§ 6, stk. 3)

Um tað er møguligt at kæra eina avgerð til ein annan fyrisitingarmyndugleika, skal hetta sostatt verða roynt, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera málið. Avgerðir, sum verða fráboðaðar skrivliga, skulu geva eina vegleiðing um møguligar kærumøguleikar, áðrenn farast kann til umboðsmannin. Eru tygum í iva, kunnu tygum venda tygum til myndugleikan, sum hevur tikið avgerðina, ella møguliga til skrivstovuna hjá umboðsmanninum.

„...Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at

tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað." (§ 6, stk. 2)

Orðingin „viðurskifti" fevnir um alt, sum klagast kann um til umboðsmannin, t.d. viðgerðina av einum máli, málsviðgerðartíðina, avgerðina í málinum, atburðin o.s.fr. Klaga tygum um eina avgerð, skal hendan sostatt verða tikin innanfyri tað seinasta árið.

Inniheldur klagan til umboðsmannin viðurskifti, sum myndugleikin ikki áður hevur tikið støðu til, sendir umboðsmaðurin næstan altíð klaguna víðari til myndugleikan og biður hendan taka støðu til hesi viðurskiftini. Samstundis verður viðkomandi kunnaður um hetta, og biðin um at bíða við at klaga til umboðsmannin, til myndugleikin hevur tikið støðu í málinum. Kemur eingin nýggj klaga, ger umboðsmaðurin ikki meira við málið.

*3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.*
Í umboðsmanslógini stendur:

*„Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um."* (§ 6, stk. 4)

Umboðsmaðurin hevur sostatt ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Hann kann nokta at viðgera klaguna sum heild ella bert at viðgera ávís viðurskifti í hesari.

Umboðsmaðurin kannar altíð eina klagu gjølla, áðrenn hann tekur avgerð um at avvísa hana. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ofta skrivar ella ringir umboðsmaðurin til viðkomandi ella til myndugleikan, fyri at hava eitt trygt grundarlag fyri avgerð síni. T.d. kann hann biðja um skjølini í málinum.

Ein avvísing av at viðgera eina klagu kann sostatt vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

**Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar**
Umboðsmaðurin kann eisini kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varur við eitt mál, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin fer at kanna viðurskifti, sum tað ikki er klagað um.

Umboðsmaðurin kann sambært §§ 6, stk. 5 og 8, stk. 3 kanna stovnar og tænastustøð v.m., ið hoyra til virkisøki hansara.

**Um umboðsmannin og embætið**
Løgtingið velur fimta hvørt ár ein Løg-

tingsins umboðsmann. Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum kunnu 2/3 av limunum loysa hann úr starvi.

Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

Tygum kunnu ringja á tlf. 35 85 00, skriva teldupost til lum@lum.fo ella venda tygum til skrivstovuna undir Bryggjubakka 11, Tórshavn, um tygum hava spurningar.